## VIÐMERKINGAR

# Tryggleiki og pláss til øll í ferðsluni

**Robert Vilhelmsen**
*Valevni Javnaðarfloksins - listi C*



VAL04

Øll eru ivaleyst samd um, at tað skal verða trygt og pláss fyri øllum borgarum í ferðsluni - í koyristóli, í barnavogni, á súklu, til gongu, motionistar, ella í einum hvørjum akfari.

Veruleikin er tíverri ein heilt annar. Tað er eitt undur at ikki enn fleiri óhapp henda við ringast hugsandi fylgjum. Sambært hagtøl frá Ráðnum fyri ferðslutrygd er títtleikin á óhappum við álvarsligum fylgjum, umleið tvífalt so stórur í mun til fólkatalið í hinum norðurlondini og nógvar ferðir størri enn í Svøríki. Hesin veruleiki eigur at takast í størsta álvara í sambandi við skipan av ferðslutrygdini í kommununi.

Í Havnini eru fleiri dømi um høvuðsvegir við nógvari og tungari ferðslu har ferðslutrygdin er út av lagi vánalig. Sum dømi kann nevnast Varðagøta, sum bert partvíst hevur gonguteigar hóast hon er høvuðsferðsluæðr til tveir av størstu skúlunum í kommununi, umframt barnagarð og vøggustovu. Umframt, at tað vanta gonguteigar, er Varðagøta sera vandamikil við fleiri vegamót, ringt ella onki útsýni og onki sum avmarkar ferðina á hesum støðum.

Neyðugt verður at seta ferðslutrygdina í hásæti, fyribyrgja, gera pláss fyri øllum og at gera hetta í tøttum samstarvi við m.a. Ráðið fyri ferðslutrygd, skúlar og løgregluna.

Við tínum stuðli og atkvøðu fer hetta at verða eitt av mínum fremstu málum at fremja í Tórshavnar kommunu.

Tryggleiki og lívsvirði - til allar borgarar!

# Skjótibreyt í Sandvíkum við stórum møguleikum

**Hans Albert Hansen**
*Hoyvík*
*Valevni Sambandfloksins*
*www.hansalbert.com*



VAL04

Sera umráðandi er at fáa gongd aftur á leirdúgvuskjótingina í Havn. Sjálvandi eiga vit í høvuðsstaðnum at hava slíkar møguleikar.

Veiðifelagið Byrsumúli hevur í skjótt 10 ár verðið forðað í at framt skjótivenjingar og skjótikappingar í Sandvíkum. Hesi viðurskifti mugu fáast í rættlag sum skjótast.

Tá hugsað verður um trygd í samband við veiðu í Føroyum, hevur eitt slíkt skjótifelag góðar møguleikar at hava skjóti- og trygdarskeið. Slík skeið áttu at verið partur av einari broyttari veiðilóggávu.

Sandvíkar eru serstakliga vælegnaðar til skjótibreytir. Við nýggjari útgerð er gjørligt at skjóta, uttan at hetta misprýðir náttúruna. Eru umstøðurnar nóg góðar letur hetta eisini møguleikar upp fyri, at ferðafólk kundu komið hendavegin á "skjótiferiu"at skotið til máls, nakað á sama hátt, sum tá ferðafólk spæla golf.

Byrsumúli skal ikki bíða longur, men hava eina skjótibreyt sum skjótast, hesum vil eg arbeiða fyri.

# Saman stendur Suðuroy sterkari

**Jaspur Vang**
*Valevni Sambandsfloksins á Tvøroyri.*



VAL04

**Kommunur í londunum uttan um okkum leggja saman, eins og alt fleiri føroyskar kommunur leggja saman. Somuleiðis leita lond, felagsskapir og vinnuvirkir, hvør í sínum lag saman í størri eindir. Yvirskipaða endamálið við nevndu samanleggingum er m.a. at rationalisera raksturin, menna um- og fyrisitingar og í felag vinna størri fíggjarliga, politiska og hugsjónarliga styrki og ávirkan.**

Í og við at Suðuroy harumframt er **eitt** vinnuøki fyri seg, **ein** arbeiðsmarknaður fyri seg, **eitt** eldraøki fyri seg, **eitt** skúla- og mentunarøki fyri seg og til seinast, men ikki minst, **eitt** valdømi fyri seg, er í mínum hugaheimi nógv, sum talar fyri, at Suðuroy hevði staðið munandi sterkari sum **ein** kommuna.

**Gongdin seinastu mongu árini.**
Tað er eingin loyna, at gongdin í Suðuroy seinastu mongu árini hevur verið tann skeiva vegin. Vit kunnu m.a. staðfesta, at fólkatalið hevur verið - og er fallandi, eins og arbeiðsloysið er vaksandi og størri enn aðrastaðni í landinum. Inntøkugrundarlagið í oynni er í ov stóran mun beinleiðis tengt at fiskivinnuni og tí óstøðugt, eins og meðalinntøkan er ov lág í mun til onnur øki í landinum. Vanda- miklasta avleiðingin av hesari skeivu gongd er, at aldursbýtið gerst alt meira avlagað, t.v.s. at talið av ungum fólki og fólki í vinnuførum aldri alsamt minkar í mun til talið av eldri fólki.

**Hvat er orsøkin ?**
Orsøkirnar til skeivu gongdina í oynni eru partvís at finna í førda landspolitikkinum og partvís her í oynni. Heldur ikki kunnu vit síggja burtur frá, at í londunum uttan um okkum er gongdin tann, at útjaðarøkini vikna í mun til meginøkini.

Tí mugu vit ásanna, at tað ikki finnast lættar og skjótar loysnir á trupulleikunum, og at tað fyrst og fremst áliggur okkum, sum búleikast í oynni og serstakliga teimum vit velja at umboða okkum lands- og kommunupolitiskt, at ganga undan í einum miðvísum, tvørpolitiskum yvirskipaðum arbeiði at menna oynna sum eina heild.

Vilja vit munandi broytingar, mugu vit fremja munandi broytingar. Verandi kommunuskipan í oynni hevur ikki megnað at forða skeivu gongdini. Heldur ikki verandi samstarv - ella rættari, tørvurin á slíkum - millum lands- og, kommunupolitikarar og aðrar áhugabólkar í oynni hevur megnað at venda skeivu gongdini.

Kommunupolitikarar hava tí skyldu at finna felags stev á eitt nú skúlaøkinum, eldraøkinum og mentunarøkinum, eins og tá umræður at skapa vinnuni bestu karmar at virka undir og ungdóminum góð kor at veksu upp - og búnast undir. Soleiðis verður fíggjarlig, politisk og hugsjónarlig orka skilabest nýtt, um vit lyfta í felag.

Harumframt hava kommunu- og landspolitikararnir í samstarvi við ymisku áhugabólkarnar í oynni skyldu til í størst møguligan mun at finna felags landspolitiskt stev, fyri síðani at gera sína ávirkan galdandi landspolitiskt, eitt nú umvegis kommunalu felagsskapirnar og umvegis landspolitikararnar, sum valdir eru í oynni. Hettar soleiðis at landspolitiska orkan í oynni kann verða nýtt á skilabesta hátt, heldur enn sum nú, har landspolitikarar, hvør í sínum lag, profilera seg fyrilitarleyst.

Landspolitiskt hevði tað yvirskipað verið munandi skilabetur, um oyggjn var ein kommuna, sum savnaði, samansjóðaði, undirbygdi og framsetti krøv og uppskot til loysnir - allari oynni til frama. Her kunnu vit nevna uppskotið frá landsstýrinum um bygging av skúladepli í Hovi og ellis- og røktarheimi í Vági sum dømi um, í hvussu stóran mun tørvandi samstarv skaðar oynna.

**Eldraøkið**
Stórrakstrarfyrimunirnir við at byggja stórt, heldur enn at byggja smátt á eitt nú eldraøkinum, áttu at veri eyðsýntir.

Tá talan er um hjálp til okkara eldru, sum eru før fyri - og ynskja at verða búgvandi heima, er tað væl eisini munandi bíligari at reka eina felags tænastu til hesi okkara eldru, heldur enn at hvør kommuna sær umsitur og rekur tílíka tænastu.

**Eitt skúla- og mentunarøki**
Tá hugsað verður um eitt nú framhaldsdeild fólkaskúlans, kvøldskúlaundirvísingina og musikskúlaundirvísingina, hevði eitt skipað samstarv um alla oynna kunna havt við sær eitt størri næmingatal. Harvið hevði verið skapt grundarlag fyri fleiri og meiri fjøltáttaðum undirvísingartilboðum, eins og verandi játtanir á økjunum kundu verið betur gagnnýttar.

**Rakstrarfyrimunir**
Ein kommunal eind, heldur enn 7 kommunur, áttu at havt við sær ein bíligari rakstur, eins og ein stór kommunal eind í oynni hevði verið før fyri at rikið eina eitt nú løgfrøðiliga og byggitekniskt sterkari umsiting, enn smáu eindirnar hvør sær eru tað. Havandi í huga tosið um at leggja alt fleiri málsøki út til kommunurnar at umsita, verður helst neyðugt við munandi sterkari kommunalari umsiting í oynni, uttan mun til um kommunurnar leggja saman ella ikki.

Soleiðis hevði heldur ikki verið neyðugt at latið eins nógvan pening av oynni fyri eitt nú løgfrøðiligar og byggitekniskar tænastur, sum vit gera tað í dag.

Sum einfalt dømi um rakstarfyrimunir kann eisini nevnast, at um oyggjin var ein kommuna, høvdu løn, fundarpeningur og aðrar samsýningar til **1 borgarstjóra og 9 ella 11 býráðslimir** verið munandi lægri, enn tilsvarandi útreiðslur til núverandi **7 bý- og bygdaráðsformenn og einar 43 bý- og bygdaráðslimir.**

**Frá sundurlyndi til samanhald**
Eg trúgvi eisini, at um oyggjin var ein kommuna, hevði tað í sjálvum sær havt við sær, at suðuroyingar í størri mun sóu - og stóðu saman um oynna sum eina heild. Hettar soleiðis, at eitt nú toganin millum bæði tey størru plássini í oynni við tíðini fekk ein enda og sundurlyndi varð vent til felags stev og tvørpolitiskt samstarv.

Av tí at tað í Suðuroy eru tvær javnt stórar kommunur, er truplari at leggja saman í eina kommunu her suðuri, enn tað hevur verið í teimum økjum, har fleiri minni kommunur hava savnað seg um eina størri kommunu. Tí er tað eisini heilt náttúrligt, at demokratiska tilgongdin hevur tikið longur tíð her í oynni, enn aðrastaðni í landinum.

**Tvær kommunur**
Verður oyggjin løgd saman í tvær kommunur, verður eftir mínum tykki enn størri gjógv millum ta, vit í dag tíverri alt og ofta nevna sunnaru - og norðaru hálvu, rakstarligu fyrimunirnir verða ov smáir, eins og fólkatalsligu - og fíggjarliga fyrimunirnir verða ov smáir og politiska slagkraftin tilsvarandi minni.

**Samanumtikið**
Grundað á tey yvirskipaðu viðurskifti, sum eru nevnd omanfyri og við atliti til gongdina uttan um okkum, er tíðin eftir mínum tykki búgvin til at leggja oynna saman í eina kommunu. Hettar eigur at verða gjørt sum skjótast, soleiðis at vit ikki gerast eftirbátar í mun til onnur øki í landinum.

## Gjald fyri valgreinar

Nú kommunuvalið er lýst, og fleiri vallistar eru almannakunngjørdir, fara vit eins og til undanfarin val at taka gjald fyri valgreinar. Gjaldið fyri valgreinar er hálvur lýsingaprísur.

**Sosialurin**










